# Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið

Dagfesting: 08.12.2023

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu**
(Stytta heitið á løgtingslógini verður broytt, nútímansgerð og nágreinan av orðskiljingum, ítøkilig heimild hjá løgregluni til atgongd til elektroniskar upplýsingar í koyrikortskránni hjá Akstovuni, broyting í reglunum um handhildna teleútgerð og øðrum handhildnum samskiftistólum, skeið um rúsdrekka og ferðslu verður víðkað til eisini at fevna um rúsevni, seta bann fyri nýtslu av øðrum lítlum motordrivnum akførum á øki, sum ferðslulógin fevnir um, viðvirkan av dómsmonnum og tillagingar av tænastugjøldum)

**§ 1**

Í løgtingslóg um ferðslu sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Sum stytt heiti á løgtingslógini verður sett:

**“(Ferðslulógin)”**

**2.** § 2, stórt rómartal III, litra C verður orðað soleiðis:
“**C. Motoramboð**: Motordrivið akfar, sum í høvuðsheitum er útgjørt sum arbeiðsamboð og gjørt til at koyra í mesta lagi 40 km/t. Motordrivið akfar, sum er ætlað at skula stýrast av persóni til gongu, er eisini at skilja sum motoramboð.”

**3.** Í § 2, stórt rómartal V, verður í øðrum reglubroti orðið “(pocketbike)” strikað.

**4.** Í § 2, stórt rómartal V, verður sum triðja reglubrot sett:
“**Annað lítið motordrivið akfar:** Motordrivið akfar á einum hjóli ella fleiri hjólum, sum hevur støðd, tilgerð ella útgerð, ið forðar akfarinum at verða góðkent til skráseting.”

**5.** Í § 13 verður sum nýtt stk. 5 sett:
“*Stk. 5.* Eftirlit hjá løgregluni sambært hesi løgtingslóg kann verða framt við beinleiðis atgongd til elektroniskar upplýsingar í koyrikortskránni, sum er grundarlag undir eftirlitinum.”

**6.** Yvirskriftin yvir § 16 b verður orðað soleiðis:

*“Nýtsla av handhildnari teleútgerð og øðrum handhildnum samskiftistólum”*

**7.** § 16 b verður orðað soleiðis:

“**§ 16 b.** Førari av akfari má ikki, meðan hann koyrir, nýta handhildna teleútgerð og onnur handhildin samskiftistól, sbr. tó stk. 2-4.
*Stk. 2.* Ásetingarnar í stk. 1 eru ikki galdandi fyri nýtsluna av handhildnari mikrofon, sum hevur samband við

samskiftisútgerð hjá løgregluni, um nýtslan er neyðug orsakað av arbeiðsuppgávum hjá løgregluni.
*Stk. 3.* Ásetingarnar í stk. 1 eru ikki galdandi fyri nýtslu av handhildnari mikrofon, sum hevur samband við ísetta teleútgerð í akførum hjá tilbúgvingini, bjargingarliði ella sjúkraflutningstænastuni, um nýtslan er neyðug orsakað av arbeiðsuppgávum hjá eindunum. Sama er galdandi fyri nýtsluna hjá vinnuførarum av handhildnari mikrofon, sum hevur samband við ísetta teleútgerð í akfarinum, um nýtslan er neyðug orsakað av vinnuligum flutningi.
*Stk. 4.* Ásetingarnar í stk. 1 eru ikki galdandi fyri nýtsluna av handhildnari mikrofon hjá koyrilærarum og próvdómarum, um nýtslan er neyðug fyri koyrifrálæruna og próvdømingina til lítið prutl, stórt prutl, motorsúkklu, traktor ella motoramboð."

**8.** Í § 18 c, stk. 3, 2. pkt. verður "rúsdrekka og ferðslu (R/F-skeiði)" broytt til: "rúsdrekka, rúsevni og ferðslu, RRF-skeiði".

**9.** § 18 c, stk. 3, 6. pkt. verður orðað soleiðis:
"Hóast ein koyriroynd er staðin, skal hin dømdi hava luttikið í skeiði í rúsdrekka, rúsevni og ferðslu, RRF-skeiði."

**10.** Í § 18 c, stk. 5 verður "R/F-skeiðunum" broytt til: "skeiði í rúsdrekka, rúsevni og ferðslu, RRF-skeiði".

**11.** Í § 18 d, stk. 2 verður "R/F-skeiði" broytt til: "skeiði í rúsdrekka, rúsevni og ferðslu, RRF-skeiði".

**12.** Í § 18 d, stk. 4 verður "R/F-skeið" broytt til: "skeið í rúsdrekka, rúsevni og ferðslu, RRF-skeiði".

**13.** Í § 58 a, stk. 1, nr. 1 verður aftan á § 60 a sett: ", § 60 b".

**14.** Í § 58 a, stk. 2 verður aftan á § 16, stk. 4 og 5 sett: "§ 16 b, stk. 1,".

**15.** Í § 58 a, stk. 2 verður "§§ 36, stk. 1-3," broytt til: "§ 36, stk. 1-4,".

**16.** Í § 58 a verður sum stk. 13 sett:
"*Stk. 13.* Fyri brot á § 60 b, stk. 1 verður ein herd sekt áløgd eigara ella útleigara av øðrum lítlum motordrivnum akførum."

**17.** § 58 f verður orðað soleiðis:

"**§ 58 f.** Mál um brot eftir ferðslulógini verða viðgjørd sbrt. kapitlunum 76-78 og 80 í rættargangslógini, uttan so at málið kann verða avgjørt við samtykki eftir § 58 g. Ásetingarnar í § 897, stk. 1 í rættargangslógini verða ikki nýttar í málum um treytaða frádøming av koyrirættinum.
*Stk. 2.* Dómsmenn viðvirka í málum, sbr. tó stk. 3:
1) har talan er um hægri revsing enn sekt,
2) har talan er um treytaleysa frádøming av koyrirættinum, sbrt. § 59 a, stk. 2, nr. 1, ella
3) har tað annars verður mett at hava serligan víðfevndan týdning fyri ákærda, ella hevur serligan almennan áhuga.

*Stk. 3.* Hóast ásetingarnar í stk. 2 viðvirka dómsmenn ikki í málum, sum:
1) verða viðgjørd eftir ásetingunum í § 831 í rættargangslógini,
2) viðvíkja rúsdrekkakoyring, sbrt. § 16 í ferðslulógini,
3) viðvíkja rúsevnakoyring, sbrt. § 15, stk. 1 í ferðslulógini,
4) viðvíkja koyring uttan førararætt, sbrt. § 18, stk. 1, § 18 a, stk. 1, ella § 18, stk. 3 í ferðslulógini, ella
5) viðvíkja koyring í frádømingartíðini, sbrt. § 58, stk. 5 í ferðslulógini.

*Stk. 4.* Almennur verji verður skikkaður eftir ásetingunum í §§ 731 og 732 í rættargangslógini. Um ákærdi biður um tað, verður ein almennur verji skikkaður av Føroya Rætti:
1) í málum har talan er um frádøming av koyrirættinum, koyriforboð ella frádøming av rættinum at koyra lítið prutl, og har dómsmenn ikki viðvirka, og
2) í málum um rúsdrekkakoyring, sbrt. § 16, ella rúsevnakoyring, sbrt. § 15, stk. 1 í ferðslulógini.

*Stk. 5.* Ákærdi verður vegleiddur um heimild til skikkaðan verja."

**18.** Í § 59 a, stk. 4, nr. 1 verður áðrenn § 29 a, stk. 3, 1. pkt. sett: "§ 16 b, stk. 1,".

**19.** Í § 59 h, 2. pkt. verður "R/F-skeiði" broytt til: "skeiði í rúsdrekka, rúsevni og ferðslu, RRF-skeiði".

**20.** Yvirskriftin yvir § 60 a verður orðað soleiðis:

*"Lítlar breytmotorsúkklur"*

**21.** Aftan á § 60 a verður sett:

"*Annað lítið motordrivið akfar*

**§ 60 b.** Tað er bannað at nýta onnur lítil motordrivin akfør á øki, sum ferðslulógin fevnir um.
*Stk. 2.* Koyrir annað lítið motordrivið akfar á øki, sum ferðslulógin fevnir um, skal tað við brotinum nýtta akfar inndragast.
*Stk. 3.* Annars eru reglurnar um inndrátt í revsilógini galdandi.
*Stk. 4.* Landsstýrismanninum verður heimilað at seta reglur um annað lítið motordrivið akfar."

**22.** Yvirskriftin yvir § 64 a verður orðað soleiðis:

*"Skoðan og umsiting av akfarsskrá"*

**23.** § 64 a verður orðað soleiðis:

"**§ 64 a.** Fyri skoðan í samband við skráseting ella góðkenning verður goldið:
1) Lastvognur, leguvognur, viðfestivognur, bulvognur ella bussur, tá akfarið hevur eina heildarvekt, ið er oman fyri 3.500 kg: kr. 650.
2) Annað akfar: kr. 450.

*Stk. 2.* Fyri umskoðan verður, hóast ásetingarnar í stk. 1, goldið:
1) Fyri akfar við heildarvekt, sum er í mesta lagi 3.500 kg: kr. 200.
2) Fyri akfar við heildarvekt, sum er yvir 3.500 kg: kr. 500.

*Stk. 3.* Um ikki verður møtt til ásetta skoðan ella umskoðan, og ikki er boðað frá í seinasta lagi dagin fyri ásettu skoðanina ella umskoðanina, skal eykagjald verða goldið, ið er sama upphædd fyri árliga gjaldið fyri tíðarvissa skoðan og umsiting av akfarsskránni sbrt. § 64 b, stk. 1. Hóast ásetingina í 1. pkt., skal ikki verða goldið, um fráveran er orsakað av sjúku, ella um aðrar heilt serligar umstøður gera seg galdandi.

**24.** § 64 b verður orðað soleiðis:

"**§ 64 b.** Fyri tíðarvissa skoðan og umsiting av akfarsskránni verður árliga goldið:
1) Motorsúkkla og stórt prutl: kr. 250.
2) Bilur við heildarvekt, sum í mesta lagi er 3.500 kg: kr. 350.
3) Bilur við heildarvekt, sum er yvir 3.500 kg: kr. 450.
4) Leguvognur, viðfestivognur ella bulvognur við heildarvekt, sum er yvir 750 kg, men í mesta lagi er 3.500 kg: kr. 350.
5) Leguvognur, viðfestivognur ella bulvognur við heildarvekt, sum er yvir 3.500 kg: kr. 450.
6) Lendisakfar: kr. 350.

*Stk. 2.* Fyri umskoðan verður, hóast ásetingarnar í stk. 1, goldið:

1) Fyri akfar við heildarvekt, sum er í mesta lagi 3.500 kg: kr. 200.
2) Fyri akfar við heildarvekt, sum er yvir 3.500 kg: kr. 500.

*Stk. 3.* Um ikki verður møtt til ásetta skoðan ella umskoðan, og ikki er boðað frá í seinasta lagi dagin fyri ásettu skoðanina ella umskoðanina, skal eykagjald verða goldið, ið er sama upphædd fyri árliga gjaldið sbrt. stk. 1. Hóast ásetingina í 1. pkt. skal ikki verða goldið, um fráveran er orsakað av sjúku, ella um aðrar heilt serligar umstøður gera seg galdandi."

**25.** § 64 c, stk. 3 og 4 verða orðað soleiðis:
"*Stk. 3*. Hóast stk. 1 og 2 verður fyri umskoðan goldið:

1) Fyri akfar við heildarvekt, sum er í mesta lagi 3.500 kg: kr. 200.
2) Fyri akfar við heildarvekt, sum er yvir 3.500 kg: kr. 500.

*Stk. 4.* Um ikki verður møtt til ásetta skoðan ella umskoðan, og ikki er boðað frá í seinasta lagi dagin fyri ásettu skoðanina ella umskoðanina, skal eykagjald verða goldið, ið er sama upphædd, sum gjaldið fyri umbidna skoðan, sbrt. stk. 1. Hóast ásetingina í 1. pkt. skal ikki verða goldið, um fráveran er orsakað av sjúku, ella um aðrar heilt serligar umstøður gera seg galdandi."

**26.** § 64 d, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"**§ 64 d.** Fyri endurrit av skrásetingarskjali ella skoðanarváttan verður goldið: kr. 150."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið
Nú eru nøkur ár liðin, síðani ferðslulógin bleiv broytt, og tí er tørvur á ymsum broytingum og tillagingum, so ásetingarnar taka støði í dagsins tørvi.

Broytingarnar í hesum lógaruppskotinum eru í høvuðsheitum hesar:

1. Stytt heitið á løgtingslógini verður sett inn.
2. Nútímansgerð og nágreinan av orðskiljingum.
3. Ítøkilig heimild hjá løgregluni til atgongd til elektroniskar upplýsingar í koyrikortskránni hjá Akstovuni.
4. Broyting í reglunum um handhildna teleútgerð og onnur handhildin samskiftistól.
5. Skeið um rúsdrekka og ferðslu verður víðkað til eisini at fevna um rúsevni.
6. Seta bann fyri nýtslu av øðrum lítlum motordrivnum akførum á øki, sum ferðslulógin fevnir um.
7. Viðvirkan av dómsmonnum í nøkrum viðgerðum av brotum av ferðslulógini.
8. Tillaging av tænastugjøldum fyri skoðan og umsiting av akfarsskránni.

*1.1.1. Stytta heitið á løgtingslógini verður broytt*
Løgtingslógin er alment kend sum “Ferðslulógin”, og tí verður skotið upp, at hetta verður sett í lógina sum stytt heiti.

*1.1.2. Nútímansgerð og nágreinan av orðskiljingum*
Broytingin verður gjørd, tí at motoramboð nú verða tilgjørd at koyra í mesta lagi 40 km/t., meðan galdandi lóggáva í allýsingini bert loyvir motoramboðum at verða gjørd til í mesta lagi 30 km/t.

Í allýsingini av lítlari breytmotorsúkklu verður orðið “pocketbike” strikað, soleiðis at týdningurin av allýsingini verður víðkaður.

Í allýsingini verða settar reglur um annað lítið motordrivið akfar á einum hjóli ella fleiri hjólum, sum hevur stødd, tilgerð ella útgerð, sum forðar akfarinum at verða skrásett. Hetta verður gjørt við tí endamáli, at m.a. rennihjól við el-motori frameftir verða fevnd av allýsingini.

*1.1.3. Ítøkilig heimild hjá løgregluni til atgongd til elektroniskar upplýsingar í koyrikortskránni hjá Akstovuni*
Í einum føri hevur ivi verið sáddur um heimildina hjá almennum eftirlitsmyndugleika til ítøkiliga atgongd til elektroniskar persónsupplýsingar, hóast myndugleikin hevur formliga heimild til allar upplýsingar í sambandi við sítt eftirlitsarbeiði. Løgreglan hevur, í sambandi við sítt eftirlitsarbeiði, formliga heimild til at kanna og/ella fáa at vita, um bilførarin lýkur treytirnar til lógliga at kunna koyra akfarið. Tað hevur við sær, at tað er neyðugt hjá løgregluni at kunna eftirkanna koyrikortviðurskiftini í koyrikortskránni hjá Akstovuni, og tí verður ein ítøkilig heimild um hetta sett í lógina.

*1.1.4. Broyting í reglunum um handhildna teleútgerð og onnur handhildin samskiftistól*
Við løgtingslóg nr. 68 frá 10. mai 2000 var forboð sett ímóti nýtslu av handhildnari fartelefon, meðan koyrt verður. Síðan tá er fartelefon vorðin hvørs mans ogn, og tøkniliga menningin á økinum hevur verið sera stór.

Sambært "Ferðslutrygdarætlanini fyri Føroyar 2019-2027" og kanningum annars, er manglandi uppmerksemi orsøk til fleiri ferðsluvanlukkur.

Í tilmæli nr. 54 í Ferðslutrygdarætlanini stendur m.a., at:

*"Gáloysni er ikki nóg væl dokumenterað í føroysku hagtølunum, men í grannalondum okkara vísa kanningar, at gáloysni er millum vanligastu orsøkir til ferðsluvanlukkur."*

Víðari stendur, at:

*"Hugburðskanningar, sum Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur gjørt, vísa, at næstan fjórði hvør førari javnan nýtir handhildna fartelefon, meðan tey koyra bil. Hetta gera tey, hóast tey vita, at tað gevur bót."*

Danska Fólkatingið samtykti um ársskiftið 2018/19 at víðka ásetingina um nýtslu av handhildnari fartelefon til eisini at fevna um onnur handhildin samskiftistól, umframt at herða revsingina við at geva eitt klipp í koyrikortið fyri nýtslu av handhildnari teleútgerð og øðrum handhildnum samskiftistólum.

Í somu lógarbroyting valdi Fólkatingið eisini at frítaka løgreglu, tilbúgving, bjargingarlið og sjúkraflutningstænastur frá forboðnum um nýtslu av handhildnari teleútgerð og øðrum samskiftistólum, um nýtslan er neyðug orsakað av arbeiðsuppgávum hjá eindunum.

Føroya Politistafelag hevur yvir fyri stjórnarráðnum víst á, at løgreglan í Føroyum hevur tørv á, at somu broytingar viðvíkjandi handhildnari fartelefon og øðrum teleútbúnaði verða framdar í ferðslulógini, tí tær hava týdning fyri arbeiðið hjá løgregluni.

*1.1.5. Skeið um rúsdrekka og ferðslu verður víðkað til eisini at fevna um rúsevni*
Í løgtingslóg nr. 49 frá 11. mai 2009 samtykti Løgtingið skeið um rúsdrekka og ferðslu í sambandi við endurtøku av koyrirættinum eftir frádøming vegna rúsdrekkakoyring. Seinastu árini hevur koyring undir ávirkan av rúsevnum vundið uppá seg, og m.a. hevur løgreglan heitt á stjórnarráðið um at víðka skeiðið um rúsdrekka og ferðslu til eisini at fevna um rúsevni, og tí verður skotið upp at fremja hesa broytingina. Hendan broytingin varð framd fyri nøkrum árum síðani í Danmark.

*1.1.6. Seta bann fyri nýtslu av øðrum lítlum motordrivnum akførum á øki, sum ferðslulógin fevnir um*
Á sumri 2021 legði løgreglan hald á 50 rennihjól við el-motori, sum endaðu á havnargøtum, har hesi vórðu bjóðað fram til útleigan til ferðandi og onnur, hóast hesi ikki kundu skrásetast, tí tey luku ikki treytirnar í § 10 í ferðslulógini um tilgerð og útgerð hjá akførum.

Málið um inndrátt endaði í rættarskipanini, og Eystari Landsrættur gjørdi í januar 2022 ein úrskurð um, at heimild ikki var fyri inndrátti av el-rennihjólunum sbrt. § 60 a, stk. 2 í ferðslulógini.

Landsrætturin vísti harumframt á, at:

*"Det bemærkes at landsretten ikke herved har taget stilling til, om el-løbehjulene lovligt kan anvendes på områder, hvor færdselsloven gælder, eller om de kan kræves registreret."*

Eftir henda úrskurð noyddist løgreglan at útflýggja el-rennihjólini aftur til eigaran.

Avvarðandi myndugleikar, sum t.d. løgreglan og Ráðið fyri Ferðslutrygd, hava heitt á landsstýrið um at fáa til vega eina ítøkiliga lógarheimild, sum bannar nýtslu av øðrum lítlum motordrivnum akførum, m.a. el-rennihjólum á ferðslulógarinnar øki.

Orsøkin er fyrst og fremst, at el-rennihjólið er ikki mett egnað til føroyska vegakervið og ferðslumynstrið, har el-rennihjól mugu vera á akbreytini millum onnur motordrivin akfør, har brúkarin av el-rennihjólinum verður tann bleyti og sárbæri parturin.

Í kunngerð nr. 34/1983 um skráseting av motorakførum er í § 38, stk. 1 ásett, at skrásetingarskyldug motorakfør skulu vera ábyrgdartryggjað, sum fyriskipað í ferðslulógini. El-rennihjól eru ikki fevnd av hesi áseting og eru sostatt ikki fevnd av lógarásettu tryggingarskylduni, men koma undir endurgjaldsskyldu fyri skaðar á persónar ella lutir, sbrt. § 54 í ferðslulógini, um tey koma til at gera skaða á persónar ella lutir.

Tá el-rennihjólini vóru í Føroyum, vísti tað seg, at tað í høvuðsheitum vóru børn og ung, heilt niður í 12-13 ára aldur, sum koyrdu á el-rennihjólunum, og ofta vóru tvey á sama el-rennihjóli úti í ferðsluni, har bæði bilar, bussar og lastbilar koyra samstundis á somu breyt.

El-rennihjólini kunnu koyra upp til 25 km/t. El-rennihjólini eru óstøðug, tí hjólini eru so smá. Harnæst eru el-rennihjólini lítil í støðd og síggjast tí illa í ferðsluni.

Samansetingin av einum vegakervi við sera fáum súkklubreytum og einum óstøðugum akfari við høgari ferð er orsøkin til, at skotið verður upp at forbjóða nýtslu av el-rennihjólum. Manglandi kunnleiki og manglandi frálæra um grundleggjandi ferðslureglur og ferðslutrygd, samanhildið við manglandi trygd og vernd, umframt manglandi kunnleika til vandar, sum kunnu standast av nýtslu av el-rennihjólinum, er ræðandi.

Endamálið við ferðslulógini er, at ongin skal doyggja ella fáa álvarsligt mein av ferðsluvanlukku í vegaflutningsskipanini. Verður nýtslan av el-rennihjólum ikki bannað á ferðslulógarinnar øki, er tað bara ein spurningur um tíð, áðrenn vit síggja álvarsomu avleiðingarnar av vandamiklu nýtsluni, tí el-rennihjólið ikki kann skrásetast sbrt. § 11 í ferðslulógini. El-rennihjól lúka ikki teknisku krøvini til skráseting, sum eru ásett við heimild í § 10 í ferðslulógini.

*1.1.7. Viðvirkan av dómsmonnum í nøkrum viðgerðum á brot á ferðslulógina*
Í sambandi við, at rættargangslógin varð broytt 1. januar 2021, er neyðugt at áseta í ferðslulógini, at dómsmenn ikki skulu viðvirka í ávísum ferðslumálum.

*1.1.8. Tillaging av tænastugjøldum fyri skoðan og umsiting av akfarsskránni*
Tænastugjøldini eru ikki tillagað síðani 1993. Tí hevur Akstovan heitt á landsstýrismannin um at tillaga nøkur tænastugjøld, so gjøldini í størri mun samsvara við kostnaðin í dag av tænastu og umsiting av akfarsskránni.

## 1.2. Galdandi lóggáva

*1.2.1. Stytt heiti*
Stytt heiti manglar í lógini, sum alment er kend sum ferðslulógin.

*1.2.2. Nútímansgerð og nágreinan av orðskiljingum*
Sambært galdandi reglum kunnu motorambоð bygnaðarliga í mesta lagi koyra 30 km/t.

*1.2.3. Ítøkilig heimild hjá løgregluni til atgongd til elektroniskar upplýsingar í koyrikortskránni hjá Akstovuni*
Sambært § 13, stk. 1 í løgtingslógini hevur løgreglan altíð rætt at steðga hvørjum akfari og fáa tað kannað ella fáa at vita, um bilførarin lýkur treytirnar lógliga at føra akfarið.

*1.2.4. Broyting í reglunum um handhildna teleútgerð og onnur handhildin samskiftistól*
Sambært galdandi reglum má førari av akfari ikki, meðan hann koyrir, brúka handhildna fartelefon.

*1.2.5. Skeið um rúsdrekka og ferðslu verður víðkað til eisini at fevna um rúsevni*
Sambært galdandi reglum kann persónur, sum er frádømdur koyrirættin treytaleyst vegna rúsdrekkakoyring, einans endurvinna koyrirættin, um hann hevur luttikið á einum skeiði um rúsdrekka og ferðslu - R/F-skeiði.
R/F-skeiðið er sett saman av 4 pørtum, frálærueindum, har hvør parturin er 2 ½ tíma til longdar, býtt yvir 4 vikur, tilsamans 10 tímar.
Undirvísararnir eru serliga góðkendir koyrilærarar.

*1.2.6. Seta bann fyri nýtslu av øðrum lítlum motordrivnum akførum á øki, sum ferðslulógin fevnir um*
Orsakað av vantandi reglum í lógini verða ásetingar um bann fyri nýtslu av øðrum lítlum motordrivnum akførum á øki, sum ferðslulógin fevnir um, settar í lógina.

*1.2.7. Viðvirkan av dómsmonnum í nøkrum viðgerðum á brot á ferðslulógina.*
Verandi § 58 f ásetur, at málini verða viðgjørd sum løgreglumál uttan dómsmenn.

*1.2.8. Tillaging av tænastugjøldum fyri skoðan og umsiting av akfarsskránni*
Tænastugjøldini fyri skoðan eru ásett í §§ 64 a – 64 d í ferðslulógini.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**

*1.3.1. Stytt heiti*
Alment er lógin kend sum “Ferðslulógin”, og tí verður skotið upp, at stytt heiti verður sett í lógina.

*1.3.2. Nútímansgerð og nágreinan av orðskiljingum*
Í § 2, stórt rómartal III, litra C er mest loyvda bygnaðarliga ferðin hjá einum motorambоði 30 km/t. Flestøll motorambоð, sum verða boðin út á marknaðinum, kunnu bygnaðarliga koyra 40 km/t. Fyri ikki at avmarka útboðið av motorambоðum í Føroyum, verður skotið upp at broyta bygnaðarligu loyvdu ferðina til 40 km/t.

Í § 2, stórt rómartal V, verður í øðrum reglubroti skotið upp at strika orðið “(pocketbike)”, soleiðis at yvirskriftin frameftir verður víðkað til at fevna um lítlar breytmotorsúkklur í breiðari merking. Somuleiðis verður orðið “(pocketbikes)” strikað í yvirskriftini yvir § 60 a.

Í § 2, stórt rómartal V, verða í triðja reglubroti settar reglur um annað lítið motordrivið akfar á einum hjóli ella fleiri hjólum, sum hevur stødd, tilgerð ella útgerð, sum forðar akfarinum at verða skrásett.

*1.3.3. Ítøkilig heimild hjá løgregluni til atgongd til elektroniskar upplýsingar í koyrikortskránni hjá Akstovuni*
Løgreglan hevur, sambært § 13, stk. 1 í ferðslulógini, heimild at fáa at vita, um bilførarin lýkur treytirnar lógliga at kunna føra akfarið. Skotið verður upp, at sett verður ein formlig heimild í lógina um, at eftirlitið hjá løgregluni, sambært hesi løgtingslóg, kann verða framt við beinleiðis atgongd til elektroniskar upplýsingar í koyrikortskránni, sum er grundarlag undir eftirlitinum.

*1.3.4. Broyting í reglunum um handhildna teleútgerð og onnur handhildin samskiftistól*
Endamálið við broytingini er, at forboðið skal fevna um øll handhildin samskiftistól, eisini íroknað fartelefon og handhildna teleútgerð. Samstundis verða givin undantøk frá forboðnum hjá m.a. løgregluni, sum í sínum arbeiði hevur tørv á at kunna nýta handhildin samskiftistól, tá førarin er einsamallur í førararúminum.
Skotið verður upp, at sektin fyri nýtslu av handhildnum samskiftistólum og handhildnari teleútgerð hækkar, og at givið verður eitt klipp í koyrikortið fyri brotið.

*1.3.5. Skeið um rúsdrekka og ferðslu verður víðkað til eisini at fevna um rúsevni*
Endamálið við broytingini er at javnseta avleiðingarnar av rúsevnabroti við rúsdrekkabrot, tá koyrirætturin skal endurtakast aftan á treytaleysa frádøming av koyrirættinum og áseta, at skeið um rúsdrekka og ferðslu eisini fevnir um rúsevni.

Harumframt er endamálið eisini at geva skeiðsnæmingunum:

- Innlit og fatan av teimum kropsligu, sálarligu og sosialu viðurskiftunum, sum hava við rúsdrekka, rúsevni og ferðslu at gera.
- Størri og víðkaðan kunnleika til mørkini fyri nýtslu av rúsdrekka og rúsevnum í samband við ferðslu.
- Størri og víðkaðan kunnleika til, nær ein, orsakað av sjúku, veikleika, overvan, svøvnloysi, ávirkan av huglættandi ella doyvandi evnum ella av tilíkum grundum, er soleiðis háttaður, at ein ikki er førur fyri at føra akfarið á tryggan hátt.
- Størri tilvitan um váðan í ferðsluni, so at teir á ein tryggan hátt kunnu koyra akfarið við neyðugum fyriliti fyri øðrum.

*1.3.6. Seta bann fyri nýtslu av øðrum lítlum motordrivnum akførum á øki, sum ferðslulógin fevnir um*
Endamálið við broytingini er at fáa til vega eina ítøkiliga lógarheimild, sum bannar nýtslu av øðrum lítlum motordrivnum akførum á ferðslulógarinnar øki, og sum heimilar inndrátti av øðrum lítlum motordrivnum akførum, um tey verða nýtt á ferðslulógarinnar øki. Somuleiðis er ætlanin at geva landsstýrismanninum lógarheimild at gera reglur um onnur lítil motordrivin akfør, harundir el-rennihjól.

*1.3.7. Viðvirkan av dómsmonnum í nøkrum viðgerðum á brot á ferðslulógina*
Í sambandi við, at rættargangslógin varð broytt 1. januar 2021, er neyðugt at áseta reglur um, nær dómsmenn ikki skulu viðvirka í ávísari málsviðgerð á brot á ferðslulógina.

*1.3.8. Tillaging av tænastugjøldum fyri skoðan og umsiting av akfarsskránni*

Tænastugjøldini eru ikki tillagað síðani 1993. Tí er ætlanin at gera broytingar í ásetingunum um gjøld fyri skoðan av akførum, soleiðis at gjøldini í størri mun samsvara við kostnaðin av skoðan og umsiting av akfarsskránni.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

*1.4.1. Stytt heiti*

Alment er lógin kend sum "Ferðslulógin", og tí verður stytt heiti sett inn í lógina.

*1.4.2. Nútímansgerð og nágreinan av orðskiljingum*

Sambært galdandi lóg kunnu motoramboð vera útgjørd til í mesta lagi at koyra 30 km/t. Hetta verður nú broytt til 40 km/t.

Orðið "(pocketbike)" í allýsingini og í yvirskriftini yvir § 60 a verður strikað, fyri ikki at avmarka lógartekstin.

Ein nýggj orðaskiljing verður sett um annað lítið motordrivið akfar á einum hjóli ella á fleiri hjólum, sum hevur stødd, tilgerð ella útgerð, sum forðar akfarinum at verða skrásett.

*1.4.3. Ítøkilig heimild hjá løgregluni til atgongd til elektroniskar upplýsingar í koyrikortskránni hjá Akstovuni*

Løgreglan hevur í § 11 b, stk. 1 atgongd til elektroniskar upplýsingar úr akfarsskránni um akfør og eigarar og/ella brúkarar. Í sambandi við eftirlitsarbeiðið hjá løgregluni hevur løgreglan altíð rætt til at steðga hvørjum akfari og fáa tað kannað ella fáa at vita, um bilførarin lýkur treytirnar lógliga at kunna føra akfarið. Hetta hevur við sær, at neyðugt er hjá løgregluni at kunna eftirkanna koyrikortviðurskiftini í koyrikortskránni hjá Akstovuni, og tí verður ein ítøkilig heimild um hetta sett í lógina.
Talgilda koyrikortið sum app á fartelefonini varð tikið í nýtslu á vári 2023, sum galdandi skjalprógv um koyrirættindi her á landi, og tí er eisini neyðugt hjá løgregluni at kunna eftirkanna upplýsingarnar á appini ímóti skrásettu upplýsingunum í koyrikortskránni.

*1.4.4. Broyting í reglunum um handhildna teleútgerð og onnur handhildin samskiftistól*

Broytingin hevur við sær, at forboðið móti nýtslu av handhildnari fartelefon, meðan koyrt verður, nú verður víðkað til at fevna um øll handhildin samskiftistól og handhildna teleútgerð, eitt nú fartelefon, smartfon, teldlar og teldur.
Samstundis verða givin undantøk frá forboðnum til m.a. løgregluna, sum í sínum arbeiði hevur tørv á at kunna nýta handhildin samskiftistól, tá førarin er einsamallur í førararúminum.

Sektin verður eisini hækkað úr kr. 1000,- til kr. 1500,- umframt, at klipp verður givið fyri nýtslu av handhildnari teleútgerð og øðrum samskiftistólum, meðan koyrt verður.

*1.4.5. Skeið um rúsdrekka og ferðslu verður víðkað til eisini at fevna um rúsevni*

Við endurtøku av koyrirættinum eftir treytaleysa frádøming vegna rúsdrekkakoyring er krav um skeið um rúsdrekka og ferðslu. Broytingin hevur við sær, at skeiðið eisini fevnir um endurtøku eftir treytaleysa frádøming vegna rúsevnakoyring.

*1.4.6. Seta bann fyri nýtslu av øðrum lítlum motordrivnum akførum á øki, sum ferðslulógin fevnir um*

Broytingin fevnir um ítøkiliga lógarheimild, sum bannar nýtslu av øðrum lítlum motordrivnum akførum á ferðslulógarinnar øki og heimilar inndrátti av øðrum lítlum motordrivnum akførum, um tey verða nýtt á øki, har ferðslulógin er galdandi.

Lítið motordrivið akfar er allýst sum eitt motordrivið akfar á einum hjóli ella á fleiri hjólum, sum hevur stødd, tilgerð ella útgerð, ið forðar akfarinum at verða góðkent til skráseting.

Landsstýrismaðurin fær heimild til at gera reglur um onnur lítil motordrivin akfør, harundir el-rennihjól.

*1.4.7. Viðvirkan av dómsmonnum í nøkrum viðgerðum á brot á ferðslulógina*
Broytingin hevur m.a. við sær, at dómsmenn ikki skulu viðvirka í málum sum viðvíkja rúsdrekkakoyring, sbrt. § 16, rúsevnakoyring, sbrt. § 15, stk. 1, koyring uttan førararætt, sbrt. § 18, stk. 1 og stk. 3 ella § 18a, stk. 1 og koyring í frádømingartíðini sbrt. § 58, stk. 5 í ferðslulógini.

*1.4.8. Tillaging av tænastugjøldum fyri skoðan og umsiting av akfarsskránni*
Broytingin hevur við sær, at tænastugjøld fyri skoðan og umsiting av akfarsskrá verða tillagað fyri at ganga umbøn frá Akstovuni á møti, soleiðis at gjøldini í størri mun avspegla veruliga kostnaðin av nøkrum av tænastunum, sum Akstovan veitir, og umsiting av akfarsskránni.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá niðanfyristandandi í tíðarskeiðinum 08.12.23-05.01.24:

- Akstovan
- Ráðið fyri Ferðslutrygd
- Løgreglan
- Fútin
- Politistafelagið
- Sorinskrivarin
- Koyrilærararnir
- Trygd
- Betri Trygging
- Vinnuhúsið
- Landsverk
- Sjúkraflutningstænastan
- Landsfelag Sløkkiliðsmanna
- Fjarskiftiseftirlitið
- Advokatfelag Føroya
- Kommunufelagið

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Lógaruppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.
Akstovan fær hægri inntøkur av tillagaðu tænastugjøldunum.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Lógaruppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri ávísar vinnur, sum t.d. hava ætlanir um at leiga el-rennihjól út.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Ongir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Ongir tvørgangandi millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

**2.9. Markaforðingar**
Ongar markaforðingar eru.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Skotið verður upp, at sektin fyri at nýta handhildna teleútgerð og onnur samskiftistól verður hækkað úr kr. 1000,- til kr. 1500,-, umframt at klipp verður givið fyri nýtslu av handhildnari teleútgerð og øðrum handhildnum samskiftistólum, meðan koyrt verður.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ásetingar um at tillaga gjøld fyri tænastuveitingar hjá Akstovuni.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur hvørki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið gevur landsstýrismanninum heimild at áseta reglur um onnur lítil motordrivin akfør sbrt. § 60 b, stk. 4.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**

**Til § 1**

Til § 1, nr. 1 – stytt heiti
Skotið verður upp at seta “(Ferðslulógin)” inn sum stytt heiti fyri løgtingslógarkunngerð um ferðslu. Treytin fyri at kunna gera brúk av styttum heiti er m.a., at heitið er alment kent. Í fólkamunni er løgtingslógarkunngerð um ferðslu vanliga kend sum “Ferðslulógin”.

Til § 1, nr. 2 - § 2, stórt rómartal III, litra C - motoramboð
Flestøll motoramboð, sum verða boðin út á marknaðinum, kunnu bygnaðarliga koyra 40 km/t. Fyri ikki at avmarka útboðið av motoramboðum í Føroyum, verður skotið upp at broyta bygnaðarligu loyvdu ferðina til 40 km/t.
Motordrivið akfar, sum er ætlað at skula stýrast av persóni til gongu, er eisini at skilja sum motoramboð.

Hóast tekniskt loyvda ferðin í mesta lagi er 40 km/t., er mest loyvda ferðin, meðan koyrt verður við motoramboði, framvegis 30 km/t. sbrt. § 30 b, stk. 4 í ferðslulógini.

Til § 1, nr. 3 - § 2, stórt rómartal V, annað reglubrot – lítil breytmotorsúkkla
Skotið verður upp at strika orðið “(pocketbike)” sum part av yvirskriftini.

Endamálið við broytingini av yvirskriftini er at víðka um allýsingina til at fevna um lítlar breytmotorsúkklur í breiðari merking.

Hetta merkir, at allýsingin frameftir ikki bert skal fevna um pocketbikes, men eisini aðrar lítlar breytmotorsúkklur á tveimum hjólum, sum eru minni enn 150 cm til longdar, og sum hava støddd, tilgerð ella útgerð, sum forðar akførunum at verða góðkend til skrásetingar.

<u>Til § 1, nr. 4 - § 2, stórt rómartal V, triðja reglubrot – annað lítið motordrivið akfar</u>
Skotið verður upp at seta eina nýggja allýsing fyri annað lítið motordrivið akfar, sum er motordrivið akfar á einum hjóli ella fleiri hjólum, sum hevur stødd, tilgerð ella útgerð, sum forðar akfarinum at verða góðkent til skráseting.

Landsstýrismaðurin fær heimild í § 60 b, stk. 4 at seta reglur um onnur lítil motordrivin akfør, sum m.a. fevnir um el-rennihjól, segboard og segways.

<u>Til § 1, nr. 5 - § 13, stk. 5</u>
Skotið verður upp, at eftirlitið hjá løgregluni sambært hesi løgtingslóg kann verða framt við beinleiðis atgongd til elektroniskar upplýsingar í koyrikortsskránni, sum er grundarlagið undir eftirlitinum. Sum er, hevur løgreglan elektroniska atgongd til upplýsingar úr koyrikortsskránni, og metingin er, at heimildin við hesi broyting verður meira ítøkilig.

Talgilda koyrikortið sum app á fartelefonini varð tikið í nýtslu á vári 2023, sum galdandi skjalprógv um koyrirættindi her á landi, og tí er eisini neyðugt hjá løgregluni at kunna eftirkannað upplýsingarnar á appini ímóti skrásettu upplýsingunum í koyrikortskránni.

Løgreglan hevur frammanundan atgongd til elektroniskar upplýsingar úr akfarsskránni við heimild í § 11 b, stk. 1, nr. 1 í ferðslulógini.

<u>Til § 1, nr. 6 - yvirskriftin yvir § 16 b</u>
Skotið verður upp at broyta yvirskriftina yvir § 16 b til eisini at fevna um nýtslu av handhildnari teleútgerð og øðrum handhildnum samskiftistólum. Hetta er ein avleiðing av broytingini í 16 b, stk. 1, sum verður víðkað til eisini at fevna um handhildna teleútgerð og onnur handhildin samskiftistól.

<u>Til § 1, nr. 7 - § 16 b</u>
**Stk. 1.**
Sambært verandi § 16 b, stk. 1 má førari av einum akfari ikki nýta handhildna fartelefon, meðan koyrt verður. Forboðið er galdandi fyri førarar á øllum motordrivnum akførum, harímillum bilar, lastbilar, bussar, motorsúkklur og prutl. Forboðið fevnir eisini um súkklandi, sbrt. § 2, stórt rómartal II, og í ávísum førum eisini brúkarar av koyristóli, sbrt. § 46 c, um koyristólurin hevur eina hægri ferð enn vanliga gonguferð.

Harumframt er verandi forboð bert galdandi fyri nýtslu av handhildnari fartelefon. Hetta merkir, at tað ikki er í stríð við verandi § 16 b, stk. 1 at nýta eina fartelefon, um fartelefonin er sett í ein haldara ella líknandi, ella um fartelefonin verður brúkt umvegis headset, bluetooth ella talitøkni (voice-teknologi), sum t.d. er innbygt í útgerðina á akfarinum.

Sum tað framgongur omanfyri, fevnir verandi § 16 b, stk. 1 bert um nýtslu av handhildnari fartelefon. Hetta merkir, at onnur teleútgerð og onnur samskiftistól, sum t.d. teldlar, teldur og GPS’arar, ikki eru fevnd av forboðnum í ásetingini. Handhildin nýtsla av tílíkari útgerð og

tólum kann tó í serligum førum verða fevnd av § 23, stk. 1 í ferðslulógini í sambandi við manglandi uppmerksemi í ferðsluni.

Broytingin av § 16 b, stk. 1 hevur við sær, at forboðið verður víðkað, og verður samstundis gjørt tøknineutralt, soleiðis at tað frameftir verður forboðið at nýta handhildna teleútgerð og onnur handhildin samskiftistól.

Hugtøkini “teleútgerð” og “samskiftistól” skulu skiljast sum eitt og hvørt snið/skap, sum fevnir um elektrisk ella elektronisk tól, sum annaðhvørt kunnu senda radiobylgjur ella móttaka radiobylgjur, ella sum kann bæði. Radiobylgjurnar skulu kunna nýtast til samskifti, harundir til nýtslu av tænastum á alnótini ella til áseting av ávísum staði. Tað er ikki avgerandi, um útgerðin ella tólið ítøkiliga hevur sent út og/ella hevur móttikið radiobylgjur í brotsgerðarløtuni, men bert um útgerðin ella tólið hevur møguleika fyri hesum.

Broytingin av § 16 b, stk. 1 fer eisini at hava við sær, at bæði fartelefonir, teldlar, GPS’arar, teldur, smartwatches, walkie-talkie o.a., sum er handhildið, frameftir verða fevnd av ásetingini. Harumframt fer handhildna forboðið eisini at fevna um nýggja teleútgerð og nýggj samskiftistól, sum fara at koma í framtíðini, um útgerðin ella tólini annaðhvørt kunnu senda ella móttaka radiobylgjur við atliti at samskifti og til áseting av ávísum staði.
Harafturímóti fevnir forboðið ikki um ítøkilig hjálpartól, undir hesum t.d. hoyritól og pacemake’arar, sum ikki eru at skilja sum samskiftistól.

Broytingin fer frameftir at fevna um alla nýtslu av handhildnari teleútgerð ella handhildnum samskiftistólum, sum t.d. at svara ella at ringja, svara ella senda SMS og MMS, gera brúk av alnótini til eitt nú at lesa ella senda teldupostar, hyggja at filmi, vera á sosialu miðlunum, samskifta umvegis Skype/Teams ella líknandi, umframt at tað heldur ikki er loyvt at gera brúk av myndatólinum ella øðrum upptøkumøguleikum á útgerðini ella á fartelefonini.
Broytingin hevur somuleiðis við sær, at tað ikki er loyvt at halda teleútgerð ella onnur samskiftistól í hondini, fyri at hyggja á skíggjan, hvat klokkan er.
Um førarin á akfarinum er noyddur at halda útgerðini í hondini, fyri at fáa klokkuna vísta á skerminum, er hetta at sammeta við nýtslu í mun til nevndu broyting, og er tí eisini forboðin.

Tað er bert tann handhildna nýtslan, sum er fevnd av forboðnum. Handfrí nýtsla av tí útgerð, sum er fevnd av broytingini, sum t.d. umvegis headset, raddarstýring (stemmestyring) ella eitt kaðal- ella tráðleyst samband, m.a. USB, Bluetooth, Wi-Fi, NFC (Near Field Communication) ella líknandi, er tískil ikki fevnd av broytingini, men kann, eftir galdandi rætti, treytað av teimum ítøkiligu umstøðunum, vera fevnd av grundreglunum um uppmerksemi í § 23, stk. 1 í ferðslulógini.

Tað er ikki í stríð við ætlaðu broytingina, um útgerðin ella samskiftistólið bert verður brúkt við hjálp av raddarstýring (stemmestyring), við hjálp frá innbygdum knøttum ella handfaringarknøttum, sum eru ísettir seinni, skermi ella líknandi á tólborðinum (intrumentbrettinum), á róðrinum, á tólborðinum ímillum framsetrini ella líknandi støð í akfarinum ella við hjálp av headsetti.

Somuleiðis er talan um handfría nýtslu, um teleútgerðin ella samskiftistólið er sett í ein haldara, sum er festur í akfarið. Útgerð ella tól, sum ikki kunnu brúkast við oman fyri nevndu tekniskt handfríu loysnum, skulu sostatt vera sett í ein haldara, sum er festur í akfarið, um nýtslan skal kunna metast sum handfrí. Hetta kravið hevur við sær, at t.d. eitt smartwatch er at meta sum handhildin teleútgerð, hvørs samskiftismøguleikar ikki mugu nýtast, meðan

koyrt verður, uttan so at ein handfríur nýtslumøguleiki er knýttur at útgerðini eitt nú umvegis eitt headset.
Hóast ongin handfríur nýtslumøguleiki er knýttur at útgerðini, so er tað ikki í stríð við ætlaðu broytingina at hyggja á sítt smartwatch fyri at síggja, hvat klokkan er.

**Stk. 2.**
Skotið verður upp, at forboðið í § 16 b, stk. 1 ikki er galdandi fyri nýtsluna hjá løgregluni av handhildnari mikrofon, sum hevur samband við samskiftistól hjá løgregluni, um nýtslan er neyðug orsakað av arbeiðsuppgávunum hjá løgregluni.

Løgreglan hevur upplýst, at tey hava tikið eitt nýtt samskiftistól í nýtslu, sum líkist einari fartelefon. Samskiftistólið, sum hevur samband umvegis eina mikrofon, kann bert lógliga verða nýtt handhildið av løgreglufólkinum sum førari av akfarinum, um løgreglufólkið er einsamalt í førararúminum í akfarinum.

Undantakið fevnir ikki um nýtsluna hjá løgregluni av øðrum sløgum av handhildnari teleútgerð ella samskiftistólum, so sum teldlar og teldur.

**Stk. 3.**
Skotið verður upp, at forboðið í § 16 b, stk. 1 ikki er galdandi fyri nýtslu av handhildnari mikrofon, sum hevur samband við ísetta teleútgerð í akførum hjá tilbúgvingini, bjargingarliði ella sjúkraflutningstænastuni, um nýtslan er neyðug orsakað av arbeiðsuppgávum hjá eindunum. Sama er galdandi fyri nýtsluna hjá vinnuførarum av handhildnari mikrofon, sum hevur samband við ísetta teleútgerð í akfarinum, um nýtslan er neyðug orsakað av vinnuligum flutningi.

Undantakið er bert galdandi fyri handhildna mikrofon, sum er sett í teleútgerð, ið er sett føst í akfarið. Sostatt fevnir undantakið ikki um nýtslu av øðrum sløgum av handhildnari teleútgerð ella øðrum handhildnum samskiftistólum sum t.d. fartelefonir ella teldlar, sum tilbúgvingin, bjargingarlið, sjúkraflutningstænastan ella vinnuførarar brúka. Um tilbúgvingin, bjargingarlið, sjúkraflutningstænastan ella vinnuførarar gera brúk av tílíkari handhildnari teleútgerð ella handhildnum samskiftistóli, meðan koyrt verður, eru tey fevnd av forboðnum í § 16 b, stk. 1.

Undantakið verður bert nýtt, um nýtslan av útgerðini er neyðug orsakað av arbeiðsuppgávum hjá eindunum ella hjá vinnuførarum í sambandi við vinnuflutning. Ásetingin gevur tískil ikki løgregluni, sbrt. stk. 2, tilbúgvingini, bjargingarliðum, sjúkraflutningstænastuni og vinnuførarum loyvi til undir vanligum umstøðum at brúka nevndu útgerð. Tað verður t.d. ikki mett at vera neyðugt, orsakað av arbeiðsuppgávunum hjá tí einstaka, um ein annar starvsfelagi er til staðar í førararúminum, sum hevur møguleika at standa fyri tí neyðuga samskiftinum.

**Stk. 4.**
Skotið verður upp, at forboðið í § 16 b, stk. 1 ikki er galdandi fyri nýtslu av handhildnari mikrofon hjá koyrilærarum og próvdómarum, um nýtslan er neyðug fyri koyrifrálæruna og próvdømingina til lítið prutl, stórt prutl, motorsúkklu, traktor ella motoramboð.

Undantakið hjá koyrilærarum og próvdómarum er bert galdandi fyri handhildna mikrofon, sum er eitt walkie-talkie, har koyrilærarin ella próvdómarin, meðan hann er einsamallur í

førararúminum í akfarinum, kann samskifta við koyrinæmingin undir koyrifrálæruni ella verkligu royndini.

Til § 1, nr. 8-12 – § 18 c, stk. 3, 2. pkt., § 18 c, stk. 3, 6. pkt., § 18 c, stk. 5, § 18 d, stk. 2 og § 18 d, stk. 4.
Skotið verður upp, at skeiðið um rúsdrekka og ferðslu, R/F-skeið, verður víðkað til eisini at fevna um rúsevni. Sostatt verður skeiðið frameftir eitt skeið um rúsdrekka, rúsevni og ferðslu, RRF-skeið. Hetta merkir, at skeiðið framhaldandi er sett saman av 4 frálærueindum, og at hvør parturin verður 3 tímar til longdar, býtt yvir 4 vikur, tilsamans 12 tímar í mun til 10 tímar frammanundan, tí at skeiðið verður víðkað til eisini at fevna um rúsevni.

Skeiðið verður boðið út av góðkendum koyrilærarum og faklærarum, t.d. rúsevnaviðgerum, og/ella av persónum, sum hava verið próvdómarar í koyrikortum eftir leiðreglum frá Akstovuni, sum hevur yvirskipaðu ábyrgdina av frálæruætlanini.

Verandi frálæruætlan fyri R/F-skeið, sum er frá 1. oktober 2009, má dagførast og tillagast broyttu reglunum um RRF-skeið, umframt at tey, sum undirvísa, eisini mugu førleikamennast til broyttu reglurnar.

Til § 1, nr. 13 - § 58 a, stk. 1, nr. 1
Skotið verður upp í vanligu heimildini í § 58 a, stk. 1, nr. 1, at ein sekt fyri brot á § 60 b verður ásett. Sektin er kr. 700,- sbrt. § 58 a, stk. 9.

Talan er um eina nýggja áseting í samband við bann av nýtslu av øðrum lítlum motordrivnum akførum á øki, sum ferðslulógin fevnir um.

Til § 1, nr. 14 - § 58 a, stk. 2
Skotið verður upp í vanligu heimildini í § 58 a, stk. 2, at ásett verður ein herd sekt fyri brot á § 16 b, stk. 1, sum er kr. 1500,-.
Sbrt. § 16 b, stk. 1 má førari av akfari ikki, meðan hann koyrir, nýta handhildna teleútgerð og onnur handhildin samskiftistól, sbr. tó stk. 2-4.

Eftir galdandi áseting er sektin kr. 1000,-.

Til § 1, nr. 15 - § 58 a, stk. 2
Skotið verður upp, at ásetingin um herda sekt, sum er kr. 1.500,-, verður víðkað til eisini at fevna um § 36, stk. 4, sum snýr seg um, at farmur skal vera soleiðis havdur, at hann ikki er til vanda fyri fólk ella veldur ognum skaða. Hann má heldur ikki verða drigin aftaná ella detta niður á vegin, elva til ørkymlandi dustrok ella líknandi ampa, órógva ferðsluna ella gera óneyðugan gang.

Er talan um farm, sum kann detta ella glíða av lastini, og sum kann verða til vanda fyri nakran í ferðsluni, verður somuleiðis í øllum førum lagt upp til treytaða frádøming av koyrirættinum.

Løgreglan hevur víst á, at tað er eitt mótsetningssamband (modsætningsforhold), at lagt verður upp til treytaða frádøming av koyrirættinum, meðan galdandi heimild bert gevur eina vanliga sekt, sum er kr. 700,-.

Til § 1, nr. 16 - § 58 a, stk. 13

Skotið verður upp, at ein herd sekt verður ásett til eigara ella útleigara av øðrum lítlum motordrivnum akførum fyri brot á § 60 b, stk. 1. Ein herd sekt er í hesum føri kr. 1500,-.

§ 60 b, stk. 1 setur forboð fyri nýtslu av øðrum lítlum motordrivnum akførum á einum hjóli ella fleiri hjólum, sum hava støðd, tilgerð ella útgerð, ið forða akførunum at verða góðkend til skrásetingar á øki, sum ferðslulógin fevnir um, m.a. rennihjól við el-motori, segboards og segways.

Til § 1, nr. 17 – § 58 f
Talan er um eina avleiðing av, at rættargangslógin varð broytt 1. januar 2021. Broytingin hevur m.a. við sær, at dómsmenn ikki skulu viðvirka í málum sum viðvíkja rúsdrekkakoyring, sbrt. § 16, rúsevnakoyring, sbrt. § 15, stk. 1, koyring uttan førararætt, sbrt. § 18, stk. 1 og stk. 3 ella § 18 a, stk. 1 og koyring í frádømingartíðini sbrt. § 58, stk. 5 í ferðslulógini.

Til § 1, nr. 18 – § 59 a, stk. 4, nr. 1
Í sambandi við, at givin verður ein herd sekt fyri nýtslu av handhildnari teleútgerð og øðrum handhildnum samskiftistólum, sbrt. § 1, nr. 14 í hesum lógaruppskoti, verður skotið upp, at nýtsla av handhildnari teleútgerð og øðrum samskiftistólum, harundir nýtsla av handhildnari fartelefon, verður fevnd av klippiskipanini sbrt. § 59 a, stk. 4, nr. 1. Hvørt brot sær gevur eitt klipp, og um so er, at førarin innan trý ár ger seg sekan í trimum tilburðum, skal hann frádømast koyrirættin treytað, sum merkir, at førarin skal til eina eftiransandi koyriroynd, sum bæði fevnir um ástøðisroynd og verkliga koyriroynd.

Til § 1, nr. 19 - § 59 h, 2. pkt.
Talan er um eina broyting sum avleiðing av broytingunum í § 1, nr. 8-12 í hesum lógaruppskotinum, har R/F-skeiðið verður víðkað til eisini at fevna um koyring undir ávirkan av rúsevnum, RRF-skeið.

Til § 1, nr. 20 - yvirskriftin yvir § 60 a
Skotið verður upp at strika orðið "(pocketbikes)" í yvirskriftini yvir § 60 a. Hetta verður gjørt fyri at víðka um hugtakið "lítlar breytmotorsúkklur".

Til § 1, nr. 21 - § 60 b
**Stk. 1**: Skotið verður upp at banna nýtslu av øðrum lítlum motordrivnum akførum, sum ferðslulógin fevnir um, m.a. el-rennihjól, segboard, segway, uniwheel (eitt stórt hjól) og onnur líknandi lítil motordrivin akfør.
Sbrt. § 2, stórt rómartal I, sbr. § 1, stk. 1, er ferðslulógin galdandi fyri ferðslu eftir vegi, sum verður nýtt av einum ferðsluslagi ella fleiri. Vegur er skilmarkaður sum vegur, gøta, pláss, brúgv, berghol, smoga, breyt o.tíl., privat sum alment.

Tó kunnu hesi lítlu motordrivnu akfør nýtast á øki, har ferðslulógin ikki er galdandi. Hetta kann eitt nú vera á avbyrgdum økjum, á størri arbeiðsplássum sum t.d. á sjúkrahúsi ella á virkjum, har strekkini kunnu vera long.

**Stk. 2:** Skotið verður upp, at koyrir annað lítið motordrivið akfar á øki, sum ferðslulógin fevnir um, skal tað við brotinum nýtta akfarið inndragast.

**Stk. 3:** Reglurnar í revsilógini um inndrátt eru galdandi.

**Stk. 4:** Skotið verður upp, at landsstýrismanninum verður heimilað at seta reglur um annað lítið motordrivið akfar. Í hesum reglum verður nágreinað, hvørji lítil motordrivin akfør eru fevnd av banninum, m.a. el-rennihjól, segboard, segway, uniwheel (eitt stórt hjól) og onnur líknandi lítil motordrivin akfør. Uppreksanin er ikki lýst út í æsir, tí tað kunnu leggjast fleiri lítil motordrivin akfør afturat sum frá líður.

Til § 1, nr. 22 – yvirskriftin yvir § 64 a
Skotið verður upp at broyta yvirskriftina yvir § 64 a til: "Skoðan og umsiting av akfarsskrá", so hon er samsvarandi innihaldinum í § 64 a.

Til § 1, nr. 23 - § 64 a
**Stk. 1:** Skotið verður upp, at gjøldini fyri skoðan í stk. 1 í sambandi við skráseting og/ella góðkenning verða tillagað við kr. 100,- fyri øll akfør. Talan er um eina upphædd, sum verður goldin í sambandi við skráseting og/ella góðkenning av akførum.
Hevur eitt akfar verið frámeldað í eitt tíðarskeið og skal skrásetast av nýggjum, verður eitt lutfalsligt skoðanargjald, sum samsvarar við eftirverandi tíðarskeið av verandi gjaldsstíðarskeiði, kravt.
Dømi: Akfar, sum verður skrásett aftur 10. mai, rindar lutfalsligt skoðanargjald fyri mai/juni og kemur síðan inn aftur í vanligu gjaldsskipanina.

**Stk. 2:** Fyri umskoðan í samband við skráseting og/ella góðkenning verður skotið upp, at gjaldið fyri akfør, við heildarvekt sum er í mesta lagi 3.500 kg., verður tillagað við kr. 100,-, soleiðis at tað frameftir verður kr. 200,-.

Fyri akfør, við heildarvekt sum er yvir 3.500 kg., verður skotið upp, at gjaldið fyri umskoðan verður tillagað við kr. 400,-, soleiðis at gjaldið frameftir verður kr. 500,-.

**Stk. 3:** Skotið verður upp, at verður ikki møtt til ásettu skoðan ella umskoðan, er freistin at boða frá broytt til dagin fyri ásettu skoðanina ella umskoðanina, uttan at eykagjald skal rindast.

Skotið verður upp, at treytin um læknaváttan í sambandi við gjald um fráveru, orsakað av sjúku, verður strikað.

Til § 1, nr. 24 - § 64 b
Gjøldini fyri tíðarvissa skoðan eru ásett sum árlig gjøld, men verða kravd inn hálvárliga saman við vektgjaldinum.

**Stk. 1:** Skotið verður upp, at gjøldini fyri tíðarvissa skoðan, sum frameftir eisini verða fevnd av umsiting av akfarsskránni, verða tillagað við kr. 100,- fyri akfarsbólkarnar, sum nevndir eru í nr. 1-6.

Sum er, rinda akfør ikki fyri at verða skrásett í akfarsskránni, hóast umsitingin og viðlíkahaldið av skránni er kostnaðarmikið. Sum dømi kann nevnast, at allir smábátar rinda kr. 200,- um árið fyri at verða skrásettir í bátaskránni.

**Stk. 2:** Skotið verður upp, at fyri umskoðan, hóast ásetingarnar í stk. 1, verður gjaldið fyri akfør, við heildarvekt sum er í mesta lagi 3.500 kg., tillagað við kr. 100,-, soleiðis at tað frameftir verður kr. 200,-.

Fyri akfør, við heildarvekt sum er yvir 3.500 kg., verður skotið upp, at gjaldið fyri umskoðan verður tillagað við kr. 400,-, soleiðis at gjaldið frameftir verður kr. 500,-.

**Stk. 3:** Skotið verður upp, at verður ikki møtt til ásettu skoðan ella umskoðan, er freistin at boða frá broytt til dagin fyri ásettu skoðanina ella umskoðanina, uttan at eykagjald skal rindast.

Skotið verður upp, at treytin um læknaváttan í sambandi við gjald um fráveru, orsakað av sjúku, verður strikað.

Til § 1, nr. 25 - § 64 c, stk. 3 og 4
**Stk. 3:** Skotið verður upp, at fyri umskoðan í sambandi við umbidna skoðan, sbrt. stk. 1 og 2, verður gjaldið fyri akfør, við heildarvekt sum er í mesta lagi 3.500 kg., tillagað við kr. 100,-, soleiðis at tað frameftir verður kr. 200,-.

Fyri akfør, við heildarvekt sum er yvir 3.500 kg., verður skotið upp, at gjaldið fyri umskoðan verður tillagað við kr. 400,-, soleiðis at gjaldið frameftir verður kr. 500,-.

**Stk. 4:** Skotið verður upp, at verður ikki møtt til ásettu skoðan ella umskoðan, er freistin at boða frá broytt til dagin fyri ásettu skoðanina ella umskoðanina, uttan at eykagjald skal rindast.

Skotið verður upp, at treytin um læknaváttan í samband við gjald um fráveru, orsakað av sjúku, verður strikað.

Til § 1, nr. 26 - § 64 d, stk. 1
Skotið verður upp, at gjaldið fyri endurrit av skrásetingarskjali ella skoðanarváttan verður tillagað við kr. 100,-, soleiðis at gjaldið frameftir verður kr. 150,-.

Kravið til skrásetingarskjalið er, at tað er prentað á serligt trygdarpappír við vatnmerki, sum er kostnaðarmikið at útvega.

**Til § 2**
Talan er um áseting um gildiskomu. Ásetingin hevur við sær, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, xx.xx.xxxx

**Dennis Holm**
landsstýrismaður

/ Elin Mortensen